

*Jóanes Høj, uttan iva fyrsti og einasti føroyski oljupallstjórin her saman við soninum Magnus*

*Mynd Jens K Vang*

**Tað var tilboð frá Landsskúlafyrisitingini fyrst í 90-unum at fara á oljuskeið í Aberdeen, ið legði lunnar undir oljuvinnuframtíðini hjá havnamanninum Jóanes Høj, sum í dag er stjóri – skipari - á norsku leitipallinum "Borgland Dolphin". Hann hevur 90 fólk í arbeiði. Jóanes skal halda fyrilestur í Oljutinginum í kvøld.**

Fyrsti føroyski oljupallstjórin:

# Gevið tol – tað tekur tíð at finna olju

OLJUTINGIÐ
*Jan Müller*

Neyvan kundi valið verið betri hjá nevndini í Oljutinginum at finna ein føroying við drúgvum og spennandi royndum í altjóða oljuvinnu at greiða frá sínum arbeiði á Jóla-oljutinginum 2003. Gestarøðari verður tann 42 ára gamli havnamaðurin, Jóanes Høj, sum í fleiri ár hevur verið stjóri ella skipari umborð á einum av teimum stóru norsku oljuboripallunum.



*Borgland Dolphin, har Jóanes Høj hevur verið skipari seinastu fimm árini. Mynd Dolphin AS.*

Pallurin eitur Borgland Dolphin er hoyrir til sama felag, sum boriskipið, Belford Dolphin, ið boraði við Føroyar í ár. Við pallinum, sum mest borar í norskum øki, eru 90 mans. Jóanes hevur verið stjóri umborð síðani 1998 og dámar honum arbeiði sera væl. Arbeiðsviðurskiftini, arbeiðstíð og løn eru góð. Hann er tvær vikur umborð og fýra vikur í landi. Í løtuni hava teir ein sáttmála við Statoil og eru í ferð við at bora ein brunn á Statfjordfeltinum í Tampen-oljuøkinum. Teir skulu til at bora eitt 5000 metra djúpt hol.

Jóanes Høj hevur arbeitt í altjóða oljuvinnuni í góð 10 ár. Sjálvur hevur hann útbúgving sum skipsførari. Hann førdi gasstangaskip í góð fýra ár, tá hann so frætti, at landsskúlafyrisitingin sendi skipsførarar oo. á skeið í oljuvinnu í Aberdeen. Tað var Claus Reistrup, sum stóð fyri tí. Hann helt hetta kundi verið áhugavert at royna, ikki minst nú føroyingar eisini vóru farnir at hugsa um olju her um okkara leiðir. Hetta hóvaði honum eisini betri, nú hann varð vorðin pápi. Skeiðið vari í tríggjar mánaðir og so mikið væl dámdi honum, at hann gjørdi av at fara inn í oljuvinnuna. Sama árið, í 1992 fekk Jóanes starv hjá Mærsk, har hann m.a. var eitt ár við einum "jackup" palli í Egyptalandi. Fram til 1998 var hann stabilitesstjóri á pallum hjá Mærsk, tað er tann, sum tekur sær av øllum trygdarmálum. Hetta árið fekk hann so boðið arbeiði hjá Dolphin Drilling. Hann tók av og hevur verið har síðani.

## Gevið tol

Jóanes roynir at fylgja við í føroysku oljutilgongdini eisini, og hóast tað ikki hevur gingið so væl við oljuleitingini her heima, so dylur Jóanes ikki fyri, at tað var við oljuvinnu her heima fyri eygað, at hann fyri merira enn 10 árum síðani tók av tilboðnum at fara á skeið í Aberdeen. – Nú fáa vit so at síggja, hvussu verður við leitingini her heima. Sjálvur haldi eg, at vit skulu geva tol. At bora fýra brunnar og ikki gera nakað lønandi fund, er ikki annað enn normalt í hesi verðini. "Successratan" her í Norra er ikki nógv frægari. Hon man liggja um 14%. Vit mugu ikki gloyna, hvat hendi í Norra á sinni, tá leitað varð eftir fyrstu oljuni. Tá vóru boraðir fleiri enn 30 brunnar, og tá Ekkofiskfeltið varð funnið vóru menn kortini við at geva skarvin yvir. So var tað at teir boraðu eitt sindur longur niður, og har funnu teir risastóra Ekkofiskfeltið.

Jóanes, sum hevur sera góðar royndir í oljuvinnuni uttan fyri Føroyar vil avgjørt mæla øðrum føroyingum at leita sær eftir arbeiði í vinnuni. Í løtuni er ringt at fáa arbeiði, men roknað verður við betri tíðum um eitt ár ella so. Tørvur er serliga á maskinmeistarum, skipsførarum og elektrikarum. Hann dylur ikki fyri, at felagið hann sjálvur arbeiðir fyri, er eitt sera gott arbeiðspláss. Teir eru góðir at arbeiða fyri, og teir seta kanska meira enn nakar annar trygdina í 1. røð. Og tað hevur alt at siga í hesi vinnuni.

Eftirspurningurin eftir pallum til oljuleiting hevur verið í slakari lagi í eina tíð men Jóanes roknar við, at hann fer at vaksa aftur. Skulu oljufeløgini undir at bora fleiri brunnar á føroyska landgrunninum í 2005 og møguliga 2006 við, so kann tað blíva torført at fáa eitt nú boriskip. Tað veldst so eisini um, hvønn prís man vil gjalda. Tað er rættiliga avmarkað við pallum og skipum til at bora á so djúpum vatni. Boriskipið Belford Dolphin, sum boraði fyri ENI í summar, er farið til India at bora. Har skal tað vera í umleið 3 ár.

Tey, ið vilja hoyra Jóanes greiða frá sínum spennandi arbeiði við evstu ábyrgd fyri einum stóru boripalli við 90 starvsfólkum kunnu leita sær í Oljutingið á Hotel Hafnia mikukvøld.



# Harry Potter gandar aftur

**So kom mest lisna bókin í øllum heiminum í 2003 á føroyskum. Harry Potter og Føniksfylkingin er tann fimta bókin um Harry Potter, og hetta er størsta einstaka útgávan hjá Bókadeild Føroya Lærarafelags, sum gevur út**

HARRY POTTER
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Harry Potter bara veksur og veksur. Hann verður eitt ár eldri fyri hvørja bók, betri umtóktur millum lesararnar, og bøkurnar gerast bara tjúkri og tjúkri. Nýggjasta bókin, »Harry Potter og Føniksfylkingin« er 812 blaðsíður, og tað er størsta útgávan hjá Bókadeild Føroya Lærarafelags higartil. Tær nógvu síðurnar hevur Bergur Rasmussen týtt eftir góðum trimum mánaðum.

Størsta bragdið hjá rithøvundanum J. K. Rowling er helst, at hon hevur fingið børn at lesa bøkur. Ongantíð áður eru bøkur seldar og lisnar í so stórum tali, og nú sigst, at útgávurnar tátta í 200 milliónir eintøk á øllum heimsins málum. Fyrsta bókin kom í 1997, og síðan komu tær næstu ár um ár. Tann fyrsta á føroyskum kom í 2000.

Nógv hevur verið gitt um fimtu bókina. Rowling var ikki eins skjót í vendingini, sum hon var við hinum bókunum, og tað fekk fólk at siga, at hon hevði fingið skriviótta, tí so stórar vónir vóru settar til hennara. Hvussu var og ikki. Nú er hon her. Á føroyskum eins og hinar fýra. Og tá ið tú lesur hana, skilir tú, at slík bók ikki verður skrivað eftir einum ári.



*– Harry Potter spákað bara inn í heysin á mær, sigur J. K. Rowling, sum fekk hugskotið til heimsins mest lisnu bøkur í tokinum frá Manchester til London*

## Avdúkar loynidóm

Sum vant leingist Harry Potter eftir at sleppa aftur til Hogwarts. Hann forvitnast eftir at vita, hví Ron og Hermione hava verið so loyndarfull og tigandi alt summarið. Fimta árið hjá Harry gerst hvørki lætt ella gott hjá Harry. Gandamálaráðið trýr ikki Harry, sum sigur, at Voldemort er afturkomin. Tey halda hann royna at gera seg áhugaverdan. Eitt umboðsfólk verður tí sett at hava eftirlit við skúlanum og fáa Harry at tiga. Tað fær skelkandi avleiðingar.

Í fimtu bókini vera loynidómar avdúkaðir, sum hava ligið undir øllum hinum fýra bókunum. Eitt nú fortelur Dumbledore Harry nakað, sum hann átti at fingið at vita fyri fimm árum síðan. Tey, sum hava lisið bøkurnar vita, at hetta er umráðandi.

## Forelskaður tannáringur

Harry er annars vorðin fimtan ár, og lagið er skiftandi. Hann er prippin, øsir seg lætt, og so er hann forelskaður fyri fyrstu ferð. Heimurin er ikki so einfaldur, sum hann helt, nú hann stendur á gáttini til vaksnamannaheimin. Harry er vorðin tineygjari.

J.K. Rowling hevur skrivað, síðan hon var barn og hevur altíð ynskt at gerast rithøvundur. Hennara stóra bragd við Harry Potter eru teir nógvu ymisku træðrirnir, sum hon fær at passa saman, so teir gerast eitt samanflættað tog. Sjálv sigur hon, at Harry Potter bara kom til hennara og var fullskaptur beinanvegin.

Umframt tær fimm bøkurnar um Harry Potter hevur hon eisini skrivað tvær ískoytisbøkur. Eina um Quittich, eitt bóltspæl á kustaskøftum, og eina um undursom beist, og hvar tú finnur tey. Bøkurnar eru til frama fyri sjúk og neyðstødd børn.




*Harry Potter og Føniksfylkingin eftir J. K. Rowling er komin í bókabúðirnar. Hon er 812 síður og kostar 380 krónur. Hestprent stóð fyri prentframleiðsluni. Bergur Rasmussen týddi. Bókadeild Føroya Lærarafelags gav út*

**Ein spennandi greipa …**




**SKIPALISTIN 2004**

hevur lógarkravdan føroyskan álmanakka, streymtalvur og streymkort umframt dagførdar upplýsingar og hópin av nýggjum myndum av føroyska flotanum. Tilfarið í *SKIPALISTANUM* er álítandi og viðkomandi hjá øllum teimum, ið hava áhuga fyri skipi og sjógvi.

***Skipalistin – hentur at hava!***

SKIPALISTIN 2004 kostar **kr. 175,-**
og innbundin **kr. 240,-**




**JOHN DAM**

er ein hin týdningarmesti skiparin og vinnulívsmaðurin í føroysku siglingarsøguni. Hann var undangongumaður í rækjufiskiskapinum, men eisini innan laksa- hemara- og skeljaveiðu gekk hann ótráddar leiðir. Hetta er ein lívssøga um áræði og framskygni, soltnar tíðir og gulltíðir, vónir og vónbrot, eydnu og lagnu. *JOHN DAM* er 400 blaðsíður við hópin av spennandi myndum.

Bókin er innbundin
og kostar **kr. 295,-**

REPROZ

***– Fæst í bókabúðunum***